# a sum ormar í sinninum



*Tórbjørn Jacobsen heldur fyrstu fólkafundarrøðuna nakrantíð á toppinum á Lítlu Dímun. Mynd Trúðboðin*

ið setti tann fyrsta hegnpelan niður yvirhøvur, mundi hava gjørt heiminum tær størstu ónáðirnar. Klandur og stríð, ræðsla, gremjan og venan. Kríggj og drápa. Í meginávaringini segði hann: "Tit eru glataði, um tit gloyma, at gróður og lív er alra manna ogn, og Jørðina eigur ongin." Nógv vatn er runnið í sjógv síðani, m.a. gjørdu hvalbingar eitt ordans hál, táið teir keyptu hesa oynna, og síðani hava teir prógvað seg sum dugnamenn undir ekstremum og marginalum umstøðum. Jørðin í Føroyum er tvíbýtt, og tað fer hon ivaleyst at vera í allari framtíð. Ongar ætlanir eru um at nationalisera ognarjørðina og á sama hátt man tann dagurin fara at vera seinur, táið politiskur meiriluti fæst fyri at privatisera landsjørðina. Eitt tvíbýti, sum føroyingurin eftir øllum at døma hevur sáttað seg við. Positivt skipar seg undir.

Tað verður róð framundir, at vit aftur standa á kreppumørkum. Frøðingar av alskyns slagi, sum í tíð og ótíð ota seg fram í spottljósið við sínum vísdómi, ganda aftur eitt svart hol fyri framman. Hugtakið kreppa er nú vorðið líka so vatndeyvt sum orðið revolution – bylting ella kollvelting. Í útvarpinum tosaði ein fyri kortum um eina kollvelting í gastronomiini, minnist ikki orsøkina, men helst var tað onkur kokkur ið hevði verið so merkiliga kreativur, at hann ístaðin fyri at loypa ella at kóka - hevði steikt eitt grunningshøvd á pannuni. Onnur kollvelting enn tær søguligu má sigast. Hugsi m.a. um tað fronsku, russisku og cubansku. Tá galt tað lív, og bardaga fyri at lágstættirnar í heila taki kundu fáa okkurt til matna. Nú er orðið devaluerað til at snúgva seg um eitt ávíst umskifti í sjálvari matgerðini.

Bara tað hakar eitt sindur í vælferðar yvirflóðini, so hongur orðið kreppa uppi yvir okkum, sum eitt svørð, nýkomið av hvørvisteininum, líka hvast sum tað, ið hekk undir bitunum hjá fyrstanum og tyranninum Dionysos, táið lív og lagna Damoklesar stóð ella fall við megini í hárinum av einum rossafaksi.

Føroyar hava tíanbetur valt at gerast ein partur av meldrinum har marknaðarmegin ræður. Í fiskivinnu og vinnu annars. Vit eru ikki komnir heilt á mál, men tað gongur skjótt tann rætta vegin. Og hetta er einasti hátturin, skulu vit vignast í einum støðugt minkandi heimi. Hetta er vinnufrymilin við evsta kappingarelementinum, ið gevur frægasta úrslitið til býtis í samfelagnum. Men vit mega venja okkum við, at heldur ikki hesin kapitalistiski búskapurin er ein endaleysur skrúvugangur. Sveiggini í streymtalvuni, sum eru meira alsjónsk í firðunum báðum kring okkum her vit nú standa, norðan- og sunnantil, eru galdandi í øllum lívsins viðurviðurskiftum. Harfyri er ongin orsøk til at rópa hesar garrvillu og glúpsku úlvarnar fram í ljósan dag, hvørja ferð tað lotar úr hanakjafti. Menniskjans spektur er so vælsignað gyrðið. Mentala skiftið so fleksibult. Hugsi um eirindaleysa filosoffin Diogenes, sum meginpartin av lívinum gekk í einum kyrtli, búði í eini tunnu og sum livdi av várkunnugávum. Táið Alexander hin Stóri var blivin herovasti í Grikkalandi, vitjaði hann kenda kyniska heimspekingin, og spurdi hann, um tað var eitthvørt hann kundi hjálpa honum við, í hansara sjálvvalda fátækdømi. Svarað varð sum væntað úr tunnuni: "Alexander, tú stendur mær í so meinur, flyt teg úr sólarglæmuni, tað er tað einasta, tú kanst hjálpa mær við í løtuni."

Kemur eitt lítið hóttafall á, so eru tað bara vit sjálvi, sum kunnu gera nakað við tað, og táið 40 ættarlið hava hórða undan okkum í oyggjunum, so er tað tekin um, at tærið er nóg máttmikið mentalt og kropsliga til at byrgja upp fyri, táið sveiggjloddið fer niðan brekkuna.

Mesti vinningurin, profitturin, kemur úr havinum og úr avleiddum vinnum á landi. Soleiðis sum landið liggur og geografiska undirlendið er skipað, eru vit spunnin inn í ein háturbulentan og háfrekventan búskap. Við lutfalsliga stórum inn- og útflutningi. Yvir tíð skulu hesir báðir faktorarnir javnviga, annars kemur sperðil í. Tvs., at í longdini stendur og fellur innflutningurin við útflutninginum. Vælferðarstøðið er tí í stóran mun ein avleiðing av tí sum framleitt verður í landinum sjálvum til útflutnings, serliga í einum landi, harið lítil ella nærum ongin framleiðsla er til egnan marknað og fáir konsumerandi munnar eru at metta.

Ein fiski- og tilfeingismálaráðharri kann tí bara hava eina kreddu í sínum politikki. At virka fyri eini so góðari stovnsrøkt sum møguligt og harvið einum í nøgd so jøvnum útflutningi sum gjørligt. Vónandi kann so ein javnur prísvøkstur menna vælferðina, og skilagóða stovnsrøktin javna sveiggini í búskapinum so væl sum gjørligt. Hetta eru lunnindini, so leingi vit hava ein monobúskap, sum fær alla sína ráværu úr havinum. Í hesum døgum er mest nýtta orðið undan hvørjum húsahorni, hvørji keys og í politisku skipanini kvennkynsorðið kreppa. Fiskaprísirnir eru lutfalsliga lágir, oljuprísurin er methøgur, vertikala integreringin í fiskivinnuni hevur fingið ein ordans lúsing, og flestu av fiskastovnunum eru trároyndir heilt at vandamørkum. Seinasti faktorurin er tann avgerandi fyri politisku skipanina. Hinar hava vit ikki stórvegis ávirkan á. Sjálvt eftir góð tríati ár við 200 fjórðinga fiskimarki, hava vit framvegis ikki funnið útav, hvussu vit skulu skipa okkum í mun til havsins tilfeingi. Nú er tann stundin komin. Umráðandi verður, at politikararnir nú trýsta á røttu knøttarnar, soleiðis at ókomnu ættarliðini arva eitt tilfeingisgrundfæ, sum gevur eina so javna og optimala resourcurentu til búskapin sum yvirhøvur gjørligt. Vanstýringin í fiskivinnumálum hesi seinastu árini eigur og skal steðga, ímeðan vitið og skilið hjá fiskimonnum, fiskifrøðingum og at sær komnum politikarum má miðja eftir krossvegnum har stál og stovnar møtast á so lívfrøðiliga og búskaparliga sjálvregulerandi støði sum gjørligt. Hetta er íløgan, vit sum nú liva og agera, kunnu gera í framtíðina hjá okkara børnum og abbabørnum. Tær avgerðir sum nú vera tiknar fáa eina kolossala ávirkan á menningina frameftir. Gera



***Stolt og hábærslig er hon, Lítla Dímun, úr tyrluni hjá Atlantsflogi. Mynd Jan Müller***